Anders Fogh Rasmussen:

# Føroyar megna ikki uttanríkis- og verjumál



*Blokkstuðulin er ikki nøkur gáva, men ein eitt gjald fyri uppgávur, sum verður avgreiddar. Tær broytingar, sum kunnu hugsast at fara fram, henda í sambandi við broytingar í uppgávubýtinum, t.e. yvirtøkur.*
*Blokkstuðulin og liberala sjónarmiðið kunnu sagtans samantvinnast, tí hetta er eitt konkret gjald talan er um*

**Anders Fogh Rasmussen er sera fegin um sín fyrsta túr sum forsætisráðharri til Føroya. Hann fegnast serliga um, at allir flokkar hava kunna tikið undir við hesum, og tónin er vorðin nógv betur. Samstarvið við bróðurflokkin, Sambandsflokkin, er líka gott sum tað altíð hevur verið. Ein yvirtøka av flogvøllinum heldur hann vera eitt stig tann rætta vegin. Politikkurin er tó tann sami sum altíð**



SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

Tað var fitt av fólki savnað úti í Tinganesi. Umboð fyri bæði Løgmansskrivstovan, Ríkisumboðið og sjálvt Statsministeriet gingu og mólu rundan um hvønn annan, tí tíðin nærkaðist, at danski forsætisráðharrin skuldi avstað aftur til sunnaru partarnar av danska kongaríkinum. Áðrenn tey mongu bíðandi sluppu avstað úr Tinganesi skuldu fjølmiðlarnir líka framat.

Skipað var fyri samrøðum við tey størru bløðini, men tað var ikki nógv tíð, ið var at fáa. Tað snúði seg tó um at fáa sum mest burturúr.

Teir báðir menninir, sum ansa eftir tíðina og hurðini skiftast um at siga við ein, at so ella so nógva tíð verður til okkum, tá ið vit fáa møguleikan innanfyri dyrnar úti í Tinganesi, har tann danski forsætisráðharrin ella statsministarin fær vitjan av tveimum forvitnum sálum úr blaðhúsinum av Argjum.

Eftir at fleiri áviringar eru givnar, er loksisn pláss fyri okkum inannfyri dyrnar, og ein framúr fryntligur og nakað so professionellur forsætisráðharri og politikari tekur ímóti, og vit sessaðust, og myndirnar sleppa at velja, hvar vit skulu sita.

Listin við spurningum er langur, men hví ikki byrja frá byrjanini.

## Nøgdur

*Er hetta ikki ein sera góð byrjan fyri tey sum forsætisráðharri í Føroyum, nú allir flokkar - á hvør sín hátt – hava sagt seg vera glaður fyri títt útspæl og framtíðar ætlanir?*

Jú, eg havi verið sera glaður fyri, at allir flokkar hava meldað aftur positivt til vitjanina og eisini felagsfráboðanina, og eg vóni við hesum, at tað hervir er skaptur ein nýggjur og betri tóni millum Føroyar og Danmark, og tað var eisini endamálið við vitjanini, og hetta haldi eg meg hava nátt. Nú snýr tað seg at meta um hvørt mál sær framyvir, og yvirtøkur kunnu fara fram, um altso blokkstuðulin í sama viðfangi minkar blokkin

*Leyp tað hvøkk á tað, at tú varð so væl móttikin í Føroyum, og at tað hevur verið so lætt?*

Vit kenna frá fyrr av, at tónin millum Føroyar og Danmark kann vera rættiliga harður, so eg eri sera fegin um, at eg eri vorðin so væl móttikin av øllum.

*Hvussu væntar tú at vera móttikin, tá ið tú kemur aftur til Danmarkar og Føroya nevndina í fólkatinginum?*

Eg vænti, at hetta verður móttikið líka positivt sum her, tí tað, sum vit hava avgjørt er nakað, ið liggur innanfyri tær avgerðir, sum higartil eru tiknar í Fólkatinginum. Vit hava eisini ein rættiliga stóran áhugi fyri, at betra um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

*Tú hevur valt at avtaka ráðgevandi nevndina fyri Føroyar, hví valdu tú at gera hetta?*

Tað gjørdi eg, tí eg metti rætt og slætt, at tað ikki var tørvur á tí longur. Serliga tá hugsað verður um, at vit hava eitt búskaparráð í Føroyum.

*Hvat hendir við flogvøllinum, um vit frá føroyskari síðu ikki avgera at yvirtaka flogvøllin?*

Vit geva føroyingum sama tilboð, sum tann undanfarna stjórnin, at føroyingar kunnu yvirtaka flogvøllin sum hann er uttan at gjalda fyri tað. Eg haldi eisini, at føroyingar eiga at yvirtaka flogvøllin. Vit hava ongar ætlanir um at nýta pening upp á flogvøllin, um hann so verður yvirtikin ella ikki. Sostatt kann mann væl taka avgerðina beinanvegin. Allir yvirtøkur eru tó treytaðar av, at føroyingar sjálvsagt sjálvir ynskja tað.

*Tað er tosað og skrivað rættiliga nógv um henda góða tónan millum Føroyar og Danmark. Leggur tú upp til við nýggja tónanum og politikkinum, at føroyingar gerast meira sjálvstøðugar?*

Fyrst og fremst má eg undirstrika, at ríkisfelagsskapurin er best, um allir partar hava tað gott í honum. Tað vil so merkja, at koma tað ynski úr Føroyum eftir galdandi lógum, so vilja vit eisini loyva tað.

Eg fari ikki sum danskur statsministari at siga nei til hetta ella hatta, men vil sum prinsipp ganga við til yvirtøkur, men hetta er treytað av, at vit ikki nerta við suverenitetin, so tosa vit um nakað heilt annað. Tá má blokkstuðulin minkast burtur í einki eftir stuttari tíð, men so leingi vil halda okkum til hetta, so allar broytingar henda eftir føroyskum ynski.

*Tú er kendur sum ein rættiliga liberalur politikari – kanska mest sum ungur - hvussu kann tað hugsast, at hesin politikkurin*

*Framhald á næstu síðu*



# Ein sigur til sambandspolitikkin

*Framhald av síðu 8*

*kemur at ávirka viðurskifti viðvíkjandi ríkisfelagsskapinum, og her verður serliga hugsað um blokkin?*

Blokkstuðulin er ikki nøkur gáva, men ein eitt gjald fyri uppgávur, sum verður avgreiddar. Tær broytingar, sum kunnu hugsast at fara fram, henda í sambandi við broytingar í uppgávubýtinum, t.e. yvirtøkur.

Blokkstuðulin og liberala sjónarmiðið kunnu sagtans samantvinnast, tí hetta er eitt konkret gjald talan er um.

*Hvat merkir ríkisfelagsskapurin í roynd og veru fyri teg, og fær tað nakrar mentunarligar fylgjur, um Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum?*

Tað merkir, at trý fólk eru saman í einum felagsskapi. Har Danmark sum tað størsta hjálpir hinum í ymiskum málum, har Grønland og Føroyar ikki megna ella vilja sjálvi.

Tað er natúrligt, at eitt fólk, sum hevur sítt egna mál og mentan alla tíðina tekur spurningum um sjálvbjargni og sjálvstýri. Eg ætli ikki at halda nøkrum aftur, um tey ynskja úr ríkisfelagsskapinum. Tað hevur verið eitt negativt forhold millum Danmarkar og Føroyar, sum mest skyldast bankasakina, og eg eri glaður fyri mátan, ið táverandi stjórnin viðgjørdi málið upp á.

Skal eg vera heilt erligur, so meti ikki, at Føroyar nakrantíð sjálvi fara at klára verju- og uttanríkismál.

*Tann politikkurin, sum tú førir nú, er tað ikki tann sami sum áður, ið tú hevur eitt nú skrivað í Nýskipanaruppskotinum hjá Sambandsflokkinum?*

Hetta er júst tann sami politikkurin sum hava ført, og eg helt m.a. eina røðu í 1998, tá eg júst var valdur formaður fyri Venstre, í Norðurlandahúsinum, har greiddi frá júst somu sjónarmiðum fyri Sambandsflokkinum. So hesin politikkurin er ikki nýggjur.

**Samstarvið millum Venstre og Sambandsflokkin er eins gott, ið tað altíð hevur verið. Politiskt er útspælið frá Løgmanni og Anders Fogh ein sigur til Sambandsflokkin, og hetta staðfestir tann politikkin hjá flokkinum, sum Anders Fogh eisini áður hevur tikið undir við, ljóðar tað úr Sambandsflokkinum**



*Samstarvið millum Sambandsflokkin og Venstre er betri enn nakrantíð, og politikkurin hjá honum er skræddaraseymaður til Sambandsflokkin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Ein tann mest umtalaði fundurin undan vitjanini hjá danska forsætisráðharranum var fundurin við Sambandsflokkin. Formaðurin fyri Javnaðarflokkin, Jóannes Eidesgaard, segði undan vitjanini hjá Anders Fogh Rasmussen, at hann helt tað vera løgið, at forsætisráðharrin valdi at fundast við ein andstøðuflokk og ikki allar ella tann størsta.

Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, segði undan vitjanini, at Sambandsflokkurin og Venstre altíð hava havt eitt tætt samstarv, og tey høvdu eisini biðið um ein fund við Anders Fogh Rasmussen, og hetta høvdu tey fingið játtað.

Á fundinum mánadagin við forsætisráðharran var tað ein væl mannað landsnevnd hjá Sambandsflokkinum, sum sessast við fundarborðið á Hafnia.

Eftir fundin fingu vit hendur á forkvinnuni í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen og næstformanninum, Alfred Olsen.

## Gekk væl

Tey bæði, Lisbeth og Alfred, vóru á einum máli um, at talan var um ein góðan fund. Ein góður, óformellir og positivur fundur kallaðu ovastu fólkini í Sambandsflokkinum fundin við leiðaran hjá bróðurflokkinum í Danmark.

Samstarvið millum Venstre og Sambandsflokkin er eins gott, ið tað altíð hevur verið, vilja tey ikki lata nakran iva vera um.

Í Sambandsflokkinum kenna tey væl Anders Fogh Rasmussen, og hann hevur eisini fleiri reisir verið í Føroyum áður m.a. fyri at vitja Sambandsflokkin.

Tað, ið Anders Fogh legði fram fyri landsnevndina í Sambandsflokkinum var nakað av tí sama, ið Anders Fogh hevði ført fram fyrr á degnum.

– Hann tosaði nokk mest til okkum sum forsætisráðharri enn sum formaðurin í Venstre. Hann veit jú, hví hann er her, siga tey bæði.

Sjálv er Lisbeth í einari serstøðu, tá ið hon jú er limur av tingbólkinum hjá Venstre, og harvið eisini ein partur av donsku stjórnini, men Lisbeth metir ikki sjálv, at hon hevur avgerandi ávirkan á støðutakanina hjá donsku stjórnini.

Allir limirnir í stóru nevndini hjá Sambandsflokkinum fingu høvi til at hitta Anders Fogh Rasmussen, og tað var eisini eitt sindur av fjáltri gekk runt og heilsaði øllum við fryntligum atburði, áðrenn hann fór víðari til døgurðan til við landsstýrismonnum og øðrum.

## Passaðu saman

Alfred og Lisbeth lótu ongan ivi vera um, at hetta var ein fundur og ein politkkur, sum passaði teimum rættiliga væl.

– Hetta er jú fullkomiliga tað sama, sum stendur í okkara Nýskipanaruppskotið, har Anders Fogh eisini sjálvur hevur skrivað eina grein, sum inniheldur júst tey somu sjónarmiðini sum hesi, sigur Alfred Olsen.

Tað er rættiliga sjónligt, at ovastarnir í Sambandsflokkinum eru fegnir um hetta.

– Politiskt er hetta ein sigur fyri Sambandspolitikkin. Hetta er jú tað, ið vit hava sagt allatíðina, sigur Lisbeth L. Petersen.

Tey bæði undirstrika, at av hesari orsøk var tað eisini ein øgilga góður stemningur á fundinum.

## Eingin stuðul

Anders Fogh Rasmussen hevur á Føroya vitjan sínari ikki roynt at dylja útyvir, at hann heldur tað vera mennandi fyri føroyska samfelagið at yvirtaka ymisk mál, eitt nú flogvøllin.

– Sambandsflokkurin er av teirri fatan, at øll mál – uttan felagsmál – skulu kunna yvirtakast, og Føroyar skulu eisini sjálvar gjalda fyri allar yvirtøkurnar, sigur Lisbeth L. Petersen.

Markið hjá Sambandsflokkurin er rættiliga líkt við markið hja Anders Fogh Rasmussen. Einasti munurin er, at Anders Fogh er av teirra fatan, at rættarskipanin kann yvirtakast, men heldur ikki her eru Sambandsflokkurin og forsætisráðharrin lagt frá hvørjum øðrum.

– Vit vilja fyrst og fremst tryggja, at vit fáa sama ágóða og somu rættindi, sum eru tryggjaði í m.a. grundlógini. sigur Alfred Olsen.

Eisini var eftir øllum at døma semja millum Sambandsflokkin og Anders Fogh viðvíkjandi blokkstuðulinum.

– Vit eru samd viðvíkjandi tí, at blokkstuðulin ikki er nøkur gávan, men heldur eitt gjald fyri veitingarnar, sigur Alfred Olsen.

Lisbeth leggur afturat, at Anders Fogh á fundinum fleiri ferðir vísti á, at tað ikki vóru danir, sum vildu lækka blokkin.

Tá vit spyrja Lisbeth um, hvørji eru vinnarar og taparar, nú forsætisráðharrin hevur meldað út, vil hon ikki beinleiðis kalla nakran vinnarar ella taparar av flokkunum, men hon heldur, at sambandspolitikkurin og fólki hevur vunnið við hesum.